

# Atlants Kolvetni funnið gass í Bretlandi

**Ingi Samuelsen**

12.09.2014 - 17:50

Oljan.fo

Atlantic Petroleum boðar í dag frá, at gass er funnið í Pegasus brunninum í bretska partinum av Norðsjóðnum.

Við støði í kjarnum og øðrum dátum frá brunninum er avgerð tikin um at gera eina útvinsluroynd (drill stem test).

Pegasus brunnurin liggur í sunnara parti av Norðsjónum, tætt við framleiðandi gassleiðina Cavendish. Atlantic Petroleum eigur 10 prosent, fyristøðufelag er Centrica Energy sum eigur 55 prosent og Third Energy Offshore eigur 35prosent.

Ben Arabo, stjóri fegnast um úrslitið av leitingini:

- Vit eru fegin um úrslitið av brunninum og um útvinsluroyndin er positiv, kann talan gerast um rakstrarverdan finning, sigur hann.